# Peugeot 2007 kemur í 2007

**Í 2007 koma Peugeot á marknaðin við einum MPV við tveimum dragihurðum á hvørjari síðu. Bilurin fær møguliga eisini navnið Peugeot 2007**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*

Nú Peugeot eru komnir á marknaðin við mini-bilinum 1007 við dragihurðum á báðum síðum, verður arbeitt víðari við sama konsepti í einum størri bili. Talan er um ein MPV við fýra dragihurðum - tveimum á hvørjri síðu. Bilurin kemur eftir ætlan á marknaðin í 2007, og møguliga verður navnið eisini Peugeot 2007.

Peugeot 2007 skal eftir ætlan kappast við bilar sum t.d. sínar landsmenn, Renault Scénic og Citroën Picasso.

Hugskotið við dragihurðum er genialt, serliga tá hugsað verður um, hvussu trong parkeringsplássini ofta eru. Men hetta er sjálvandi nakað, man skal venja seg til at brúka. Sum tað sæst í myndini, er eisini lætt at koma inn og út úr bilinum.



*Peugeot 2007 við tveimum dragihurðum í hvørjari síðu. Hugskotið við dragihurðum er genialt, serliga tá hugsað verður um parkering, har tað er trongt*

# Nýggjur Zafira í september




*Í september kemur ein nýggjur Opel Zafira við 7 sitiplássum á marknaðin. Bilurin líkist forgaranum uttan*

**Í september 2005 kemur ein nýggjur Opel Zafira á marknaðin. Bilurin avloysir forgangarin, sum var ein tann fyrsti í sínum klassa við 7 sitiplássum. Nýggi Zafira verður nakað størri**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Opel Zafira verður í september avloystur av einum nyggjum Zafira, sum verður umleið 15 cm longri og næstan 6 cm breiðari enn forgangarin. Viðførisrúmið verður 645 litrar - hetta er 45 litrar meira enn forgangarin. Við øllum baksetrunum niðri verður vørurúmið heilir 1.820 litrar.

Zafira kemur við fleiri ymiskum motorstøddum. Bensinmotorarnir byrja við 1,6 litur Twinsport við 105 hk, síðan er ein nýggjur 1,8 litur við 140 hk. 1,9 CDTi dieselmotorurin hevur 120 hk. Eisini verður ein 2,2 litur bensin við beinleiðis innspræning og 155 hk og ein 2,0 turbo við 200 hk. Umframt verða eisini tveir dieselmotorar við ávikavist 100 og 150 hk. Størsti motorurin verður ein við 240 hk í OPC útgávuni. Hesin kemur seinni í ár.

Annars líkist bilurin forgangaranum uttan, men innan er ein heilt nýggjur stílur við t.d. nýggjum instrumentborði.





*Innan er ein heilt nýggjur stílur við t.d. nýggjum instrumentborði*